UTTAN ÚR HEIMI

## Summarfuglar í Íshavinum

Vísindafólkini umborð á norska havrannsóknarskipinum "Johan Hjort" gjørdust ikki sørt bilsin, tá tey seinasta leygardag varnaðust summarfuglar í hundraðtali sveima uppi yvir skipinum.

"Johan Hjort" gjørdi kanningar eystan fyri Bjarnoynna, og norsku vísindafólkini høvdu ikki ímyndað sær at síggja summarfuglar har á leiðini. Kjell Nedreaas, sum stendur fyri kanningunum, sigur við Aftenposten, at hann vildi ikki trúgva starvsfeløgunum, tá teir bóðu hann koma at hyggja eftir teimum sjáldsomu gestunum. Hann sigur, at hendan morgunin var landssynningur og rættiliga lýtt í veðrinum, og at summarfuglarnir helst eru komnir við tí lýggja vindinum.

Kjell Nedreaas hevur verið á nógvum havrannsóknarferðum ígjøgnum árini, men hetta er fyrstu ferð, at hann hevur sæð summarfugl í Barentshavinum, sigur hann.

Lita Greve Jensen, sum dagliga arbeiðir við flogkyktum, sigur við Aftenposten, at hon hevur heldur ongantíð hoyrt um summarfuglar í Barentshavinum.

## Skúlin opin aftur

Fyri trimum árum síðani skjeyt ein fyrrverandi næmingur 13 lærarar, tríggjar næmingar og síðani seg sjálvan í einum skúla í eysturtýska býnum Erfurt. Síðani er skúlin umbygdur og umvældur fyri 70 milliónir krónur, og mánadagin bleiv hann tikin aftur í brúk.

Gerhard Schröder, kanslari, var hjástaddur, nú skúlin lat uppaftur. Samstundis varð skipað fyri einum minningarhaldi til minnis um tey, sum lótu lív fyri trimum árum síðani, og kanslarin segði í sínari røðu, at hóast gerandisdagurin er byrjaður aftur, fara fólk altíð at minnast skúlan í Erfurt.

Tilburðurin fyri trimum árum síðani skakaði alt Týskland. Tann 19 ára gamli Robert Steinhauser hevði ikki staðið royndina og var koyrdur úr skúlanum. Tríggjar mánaðir seinni kom hann aftur í skúlan við byrsu og skammbyrsu.

## Avgjald til tey fátæku londini

Í seinastuni hava fleiri lond umrøtt møguleikan at leggja eitt avgjald á flogferðaseðlar og at brúka pengarnar til at hjálpa teimum fátæku londunum við, men tað hevur víst seg at vera trupult at semjast um ætlanina.

Men nú hevur franska stjórnin gjørt av at seta skipanina í verk fyri at vísa umheiminum, at tað ber til, skrivar AP. Jacques Chirac, forseti, segði á einum fundi í París fyrradagin, at pengarnir frá avgjaldinum skulu brúkast til at hjálpa teimum fátæku londunum í bardaganum ímóti eyðkvæmi, tuberklum og malaria.

Týskland, Spania, Brasil, Algeria og Kili hava boðað frá, at tey fara at taka undir við einum uppskoti um ein fátækraskatt, tá málið kemur til viðgerðar á ST-toppfundinum miðskeiðis í næsta mánað. Uppskotið er upprunaliga franskt, tí tað var franski fíggjarmálaráðharrin, Thierry Breton, sum bar tað upp á mál á einum ST-fundi í summar.

## Horvin nunna funnin

Í 1977 burturflutti hernaðarstýrið í Argentina fronsku nunnuna Leonie Duquet. Fyri einum hálvum ári síðani hildu argentinsku myndugleikarnir seg hava funnið leivdirnar av henni, og nú hava DNA-kanningar prógvað, at talan er um ta horvnu nunnuna.

Tað vakti stóran ans um allan heimin, tá Leonie Duquet bleiv burturflutt. Hon arbeiddi saman við kvinnum, sum vildu hava at vita, hvat hernaðarstýrið hevði gjørt við synir teirra. Tað hóvaði ikki stýrinum, og í desember í 1977 bleiv Leonie Duquet burturflutt saman við einari aðrari franskari nunnu, Alice Domon. Hon spurdist heldur ikki aftur.

Í 1990 dømdi ein franskur dómstólur fyrrverandi argentinska herflotayvirmannin Alfredo Astiz lívlanga fongsulsrevsing fyri at hava burturflutt tær báðar nunnurnar, men Argentina hevur sýtt fyri at senda hann til Fraklands.

Alment hvurvu umleið 13.000 fólk tey árini, hernaðarstýrið hevði valdið í Argentina, men mannarættindafelagsskapir vilja vera við, at tað veruliga talið er tætt við 30.000.

# Irakska grundlógin vegleiðing til ruðuleika



*Sunnimuslimar í Tikrit mótmæla uppskotinum til nýggja irakska grundlóg*

**Uppskotið til nýggja grundlóg í Irak fer at elva til spjaðing ímillum irakar, heldur aðalskrivarin í Arabisku Samgonguni**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

- Hatta er ein beinrakin vegleiðing, um tú vilt hava ruðuleika, sigur Amr Moussa við BBC.

Hann skilir væl, at túsundtals sunnimuslimar hava gingið mótmælisgongu í fleiri irakskum býum, síðani ein meiriluti í tjóðartinginum samtykti at góðkenna grundlógaruppskotið. Sunnimuslimarnir stúra fyri, at teir verða við skerdan lut, um shiamuslimarnir og kurdarnir sleppa at býta Irak sundur í trý sjálvsstýrandi øki.

- Eg skilji væl, at teir stúra fyri gongdini, tí tað ber ikki til at býta Irak sundur ímillum shiamuslimar og sunnimuslimar, ímillum muslimar og kristin, ímillum arabar og kurdar. Hatta gongur ikki, og í mínum eygum er hatta ein sera beinrakin uppskrivt uppá, hvussu tú kanst fáa ruðuleika. Ikki bara í Irak, men í øllum økinum, sigur Amr Moussa.

Hann er aðalskrivari í Arabisku Samgonguni, sum umfatar 21 arabisk lond, teirra millum Irak.

**Óttast gongdina**

Eygleiðarar siga við Reuters, at tað er tvinnar orsøkir til, at Arabiska Samgongan vendir sær frá irakska grundlógaruppskotinum. Onnur er, at lógin kann geva shiamuslimunum og kurdunum ræðið í hvør sínum parti av Irak, og at tað kann fáa minnilutar í øðrum arabiskum londum at krevja tað sama. Hin orsøkin er, at tey arabisku londini vilja fegin hava semju ímillum fólkabólkarnar í Irak, tí áhaldandi ósemja og stríð har kunnu breiða seg út um irakska markið.

Tað eru tó ikki allir sunnimuslimar, sum halda seg hava tapt stríðið um, hvussu Irak skal skipast. Ein av teimum stóru sunnimuslimsku flokkunum hevur boðað frá, at hann ætlar at halda fram við royndunum at finna eina neyðsemju, men sambært Reuters hava tey flestu smáar vónir um, at nakað kann koma burturúr.

Teir seinastu dagarnar hava fleiri túsund sunnumuslimar gingið mótmælisgongu í býnum Tikrit, haðani Saddam Hussein er ættaður. Tey høvdu myndir av gamla leiðaranum og róptu, at tey fara ikki at góðtaka grundlógaruppskotið.

# Atfinning kostaði starvið

**Bunnatine Greenhouse fekk sekkin, tí hon fanst at samstarvinum ímillum amerikanska verjumálaráðið og fyritøkuna Halliburton**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Bunnatine Greenhouse hevði eitt týðandi starv í amerikanska herinum, men fyri nøkrum døgum síðani bleiv hon uppsøgd. Grundgevingin var, at hon var ikki nóg dugnalig, men sakførari hennara heldur ikki, at tað var tann veruliga orsøkin til uppsøgnina.

- Uppsøgnin er ein ávaring um, at fólk í herinum eiga ikki at gera viðmerkingar til teir sáttmálar, sum herurin ger. Gera tey tað, kunnu tey vænta at missa starvið, skrivar sakførarin Michael S. Kohn í einum brævi til Donald Rumsfeld, verjumálaráðharra.

Í fjør fanst Bunnatine Greenhouse at herleiðsluni, tí hon hevði givið einum dótturfelag hjá fyritøkuni Halliburton ein stóran sáttmála í sambandi við arbeiðið at byggja iraksku oljuvinnuna uppaftur. Skjølini í málinum vístu, at felagið hevði fingið sáttmálan, longu áðrenn kríggið í Irak byrjaði, og at einki annað felag slapp at bjóða upp á arbeiðið.

Málið vakti ans, tí Dick Cheney, varaforseti, var stjóri í Halliburton, áðrenn Bush valdi hann til varaforseta. Cheney hevur fyrr sagt, at Halliburton hevur ikki fingið sersømdir frá amerikonskum myndugleikum. Men Bunnatine Greenhouse og sakførari hennara eru ikki samd við honum í tí.